# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 28. oktober 2019
Mál nr.: 19/00311
Málsviðgjørt: HKV
Eftirkannað: 23.10.2019

**Løgtingsmál nr. 12/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)** (Frádráttur til lærlingar á 50.000 kr. árliga)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)

(Frádráttur til lærlingar á 50.000 kr. árliga)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 191 frá 21. desember 2018, verður í § 33, stk. 1 sum nr. 19 sett:
"19) upp til kr. 50.000 árliga av skattskyldugari inntøku hjá lærlingum. Sum lærlingur er at meta persónur, ið er fevndur av einum galdandi lærusáttmála. Talan skal vera um lærusáttmála, ið er góðkendur av Yrkisdeplinum, ella um lærusáttmála, har úbúgvingin er skipað og lønt sambært sáttmála millum fakfelag og arbeiðsgevara á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Persónur, ið er í starvsvenjing sum partur av útbúgving síni, er ikki at meta sum lærlingur. Fevnir lærutíðin einans um ein part av inntøkuárinum, verður frádrátturin fyri inntøkuárið veittur lutfalsliga, har dagatalið sum lærlingur verður sett í mun til dagatalið í árinum. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri umsókn, váttan, tíðarfreistir og annað, og í hesum sambandi eisini reglur um, at neyðugar upplýsingar og skjøl skulu latast umvegis talgildu sjálvgreiðslurnar hjá TAKS"

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Nýggja samgongan hevur sett sær fyri at betra um fíggjarligu viðurskiftini hjá lærlingum. Hetta er bæði fyri at gera tað meira áhugavert at fara í læru, og eisini fyri at tað skal loysa seg betur hjá lærlingum at átaka sær úrtíðararbeiði í lærutíðini.

Víst verður til samgonguskjalið har tað stendur:

> “Yrkisútbúgvingarnar í Føroyum hava stóran samfelagsligan týdning, vit eiga framhaldandi at menna og tillaga hesar. Fyri lærlingar verður botnfrádrátturin í skattinum hækkaður.“

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi lóggávu rinda lærlingar skatt eftir somu treytum sum aðrir vanligir skattgjaldarar.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið er at gera tað meira áhugavert at gerast lærlingur, og at stimbra hugin hjá lærlingum at átaka sær yvirarbeiði í lærutíðini.

Mælt verður til, at lærlingar fáa ein frádrátt í skattskyldugu inntøkuni á 50.000 kr. árliga. Frádrátturin fer at hava við sær ein skattalætta, tí nú skal skattur roknast av eini inntøku, sum er 50.000 kr. lægri enn tann “veruliga” inntøkan. Til dømis fer ein lærlingur við ársinntøku á 150.000 kr. nú einans at rinda skatt av 100.000 kr., tí hinar 50.000 kr. gerast skattafríar. Somuleiðis fer lærlingur við inntøku á 200.000 kr. nú at rinda skatt av 150.000 kr. og so framvegis.

At skattskylduga inntøkan lækkar, hevur við sær ein lætta í teimum skattum og gjøldum, sum verða rindað av skattskyldugu inntøkuni. Hesi eru:

- Landsskatturin
- Kommunuskatturin
- Kirkjuskatturin
- Gjaldið til Heilsutrygd (er partvís fast gjald og partvís av skattskyldugu inntøkuni)
- Gjaldið til AMEG

Roknað verður við, at broytingin fer at hava við sær, at flestu lærlingar fara at fáa umleið 1.650 kr. meira útgoldið um mánaðin komandi ár. Hjá teimum við góðari inntøku afturat lærlingalønini kann lættin tó gerast nakað størri – og hjá teimum við einans lítlari lærlingaløn kann lættin gerast nakað minni.

Í talvuni niðanfyri verður víst, hvussu stórur skattalættin verður fyri ymiskar inntøkubólkar.

| **Skattskyldug inntøka** | **75.000** | **100.000** | **150.000** | **200.000** | **300.000** |
|---|---|---|---|---|---|
| Frádráttur | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| **Skattskyldug inntøka við frádrátti** | **25.000** | **50.000** | **100.000** | **150.000** | **250.000** |
| Sparing í landsskatti | 1.500 | 5.250 | 7.500 | 7.500 | 10.000 |
| Sparing í kommunuskatti | 9.086 | 10.095 | 10.095 | 10.095 | 10.095 |
| Sparing í kirkjuskatti | 270 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| Sparing í gjaldi til Heilsutrygd | 300 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| Sparing í gjaldið til AMEG | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| **Skattalætti íalt - árliga** | **12.656** | **17.445** | **19.695** | **19.695** | **22.195** |
| **Skattalætti íalt - mánaðarliga** | 1.055 | 1.454 | 1.641 | 1.641 | 1.850 |

Hvør verður fevndur av frádráttinum?

Ætlanin er, at frádrátturin skal verða veittur øllum lærlingum, sum eru fevndir av einum galdandi lærusáttmála. Tað vil siga, talan skal verða um persónar, ið eru í sokallaðari meistaralæru ella sveinalæru.

Fyri at verða mettur sum lærlingur sambært uppskotinum, skal í minsta lagi onnur av hesum treytum vera lokin:

1. Talan skal verða um sáttmála, ið er góðkendur av Yrkisdeplinum.
2. Talan skal verða um lærusáttmála, har úbúgvingin er skipað og lønt sambært sáttmála millum fakfelag og arbeiðsgevara á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Yrkisdepilin góðkennir nógv tær flestu lærlingaútbúgvingarnar, bæði innan handverk, handil, skrivstovu, matvørur o.s.fr.

Tó eru fleiri útbúgvingar, ið Yrkisdepilin ikki góðkennir, men sum eisini eftir ætlan skulu verða fevndar. Her kunnu til dømis nevnast lærlingar í tryggingarfeløgum og peningastovnum, lærlingar í apoteksverkinum (farmakonomar) og líknandi útbúgvingar. Hesar útbúgvingar verða ikki góðkendar av Yrkisdeplinum. Men tær eru skipaðar og løntar sambært sáttmála millum fakfeløg og arbeiðsevarar á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Tað finnast eisini útbúgvingar, ið ikki eru lærlingaútbúgvingar, men har starvsvenjing er ein partur av útbúgvingini. Hesi lúka ikki treytirnar fyri at fáa frádráttin, tí tey eru ikki fevnd av einum lærusáttmála.

Roknað verður við, at umleið 1.000 persónar verða fevndir av skipanini árliga.

Hvat fevnir frádrátturin um?

Ásett er, at dragast kunnu frá "upp til" 50.000 kr. árliga í inntøkuni. Hetta merkir, at um inntøkan er minni enn 50.000 kr. verður frádrátturin minni enn 50.000 kr. Tað vil siga, at inntøkuuppgerðin fer ikki at vísa hall, um tað skuldi komið fyri, at inntøkan er minni enn 50.000 kr.

Við inntøku verður hugsað um alla ta vanligu skattskyldugu inntøkuna. Tað vil siga, tað umfatar bæði lærlingalønina og aðra skattskylduga inntøku, sum lærlingurin hevur. Tað vil siga, aðra arbeiðsinntøku, skattskyldugar almennar veitingar og líknandi.

Men talan skal tó vera um vanliga skattskylduga inntøku. Dragast kann ikki frá í inntøkum, sum ikki verða skattaðar sambært vanliga skattastiganum, sum til dømis inntøku frá FAS-skipanini, uttanlandsinntøku sambært § 25b ella líknandi.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Uppskotið hevur við sær, at lærlingar nú fara at rinda minni í skatti. Mett verður, at fyri flestu lærlingar verður talan um ein skattalætta á góðar 19.500 kr. árliga, ella umleið 1.650 kr. mánaðarliga.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið hevur verið í almennari hoyring á hoyringarportalinum hjá Føroya landsstýri.

Harumframt varð uppskotið sent beinleiðis til hesar hoyringarpartar:

- Vinnuhúsið
- Felagið føroyskir peningastovnar
- Starvsmannafelagið
- Føroya Handverkarafelag
- Landsfelag handverkaranna
- YTF
- Finansforbundet
- Farmakonomfelagið Føroyadeild
- Kost- & Føðslu felagið
- S&K
- Yrkisdepilin
- Kommunufelagið
- Kommunala Arbeiðsgevarafelagið
- TAKS
- Føroya Tannlæknafelag

**Samandráttur av hoyring**

Hoyringarsvar eru komin frá Yrkisdeplinum, Føroya Handverkarafelag, Kommunufelagnum, Landsfelag Handverkaranna, YTF, Vinnuhúsinum og TAKS.

Yrkisdepilin og YTF hava ongar viðmerkingar til uppskotið. Føroya Handverkarafelag vísir á, at talan er um eitt sera gott uppskot. Landsfelag Handverkaranna tekur undir við uppskotinum.

**Vinnuhúsið**

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísa á at:

> "Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, umframt Handilsvinnufelagið, Ferðavinnufelagið og KT-felgið, sum eru vinnugreinafeløg, ið varða av lærlingum, taka væl ímóti uppskotinum."

Felagið vísir somuleiðis á, at:

> "Arbeiðsgevarin fær atgongd til meira arbeiðsmegi, og lærlingurin fær møguleika fyri at vinna nakrar eyka krónur. Harumframt fær lærlingurin ein eyka vinning burtur úr læruni, sum hann fær burtur úr arbeiðinum við síðuna av vanligu lærutíðini."

Eisini verður sagt, at uppskotið kann eggja fólki í at fara í læru.

**Kommunufelagið**
Kommunufelagið fýlist á stuttu hoyringarfreistina á einans 12 dagar, og felagið vísir á, at:

> "Orsaka av stuttu hoyringsfreistini, so hevur stýrið Kommunufelagsins ikki havt møguleika at viðgera uppskotið. Av somu orsøk tilskilar felagið sær rætt til at koma við fleiri viðmerkingum seinni."

Eisini ger felagið vart við, at uppskotið hevur við sær ein inntøkumiss fyri kommunurnar á oman fyri 10 mió. kr. Felagið vísir á, at landsstýrið heldur átti at valt eina loysn við afturbering, ið ikki hevði kostað kommununum nakað.

**TAKS**
TAKS vísir á, at ásetingin um, at lærlingar skulu verða fevndir av "galdandi" lærusáttmála fevnir ov breitt til at avmarka skaran av lærlingum. Har verða ov nógv ivamál.

***FMR er samt við TAKS í hesum. Orðingin er nú broytt til*:**

> "Talan skal verða um lærusáttmála, ið er góðkendur av Yrkisdeplinum, ella um lærusáttmála, har úbúgvingin er skipað og lønt sambært sáttmála millum fakfelag og arbeiðsgevara á føroyska arbeiðsmarknaðinum."

Eisini vísir TAKS á, at tað er ov ógreitt, hvørja inntøku frádrátturin fevnir um.

***FMR er samt við TAKS í hesum***
Nú er innsett ein nærri útgreining bæði í almennu og serligu viðmerkingarnar, har greitt verður frá, at talan er um alla vanliga skattskylduga inntøku, og at dragast kann ikki frá í inntøkum, sum ikki verða skattaðar sambært vanliga skattastiganum, sum til dømis inntøku frá FAS-skipanini, uttanlandsinntøku sambært § 25b ella líknandi.

Harumframt ger TAKS vart við, at uppskotið hevur við sær munandi umsitingarligan kostnað fyri TAKS.

**Her hevur FMR í samráð við TAKS broytt munandi um orðingina:**
Nú er í staðin ásett, at landsstýrismaðurin kann áseta í kunngerð, at neyðugar upplýsingar og skjøl skulu latast umvegis talgildu sjálvgreiðslurnar hjá TAKS. Hetta er ásett, tí ætlanin er, at lærlingar, ið søkja um frádrátt, skulu gera hetta umvegis talgildu skipanirnar hjá TAKS. Hetta fer væntandi at minka munandi um umsitingarliga kostnaðin.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Teir skattir og gjøld sum verða rindað av skattskyldugu inntøkuni eru: landsskatturin, kommunuskatturin, kirkjuskatturin, gjaldið til AMEG og gjaldið til Heilsutrygd.

Tá skattskylduga inntøkan hjá hvørjum lærlingi minkar við 50.000 kr. árliga, verður roknað við, at almennu inntøkurnar minka við samanlagt 19,7 mió. kr. árliga.

Roknað verður við, at skattainntøkurnar hjá landinum minka við 7,5 mió. kr., hjá kommununum við 10,1 mió. kr., kirkjuskatturin minkar 0,3 mió. kr., inntøkan hjá AMEG minkar við 1,5 mió. kr. og inntøkan hjá Heilsutrygd við 0,3 mió. kr.

| Landið | Kommunur | Kirkjuskattur | AMEG | Heilsutrygd | **Tilsamans** |
|---:|---:|---:|---:|---:|---:|
| 7,5 | 10,1 | 0,3 | 1,5 | 0,3 | **19,7** |

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS, sum fer at umsita skipanina. Roknast kann við umsitingarligum kostnað, tí talan verður um skipan, har lærlingar skulu søkja um frádrátt, og slíkt krevur altíð arbeiðsorku.

Men hinvegin er ásett í uppskotinum, at landsstýrismaðurin kann áseta í kunngerð, at neyðugar upplýsingar og skjøl skulu latast umvegis talgildu sjálvgreiðslurnar hjá TAKS. Hetta er ásett, tí ætlanin er, at lærlingar, ið søkja um frádrátt, skulu gera hetta umvegis talgildu skipanirnar hjá TAKS. Hetta fer væntandi at minka munandi um umsitingarliga kostnaðin.

Sambært meting frá TAKS fer tað at kosta umleið 50.000 kr. at seta skipanina í verk.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið kann hava jaligar avleiðingar fyri vinnuna, tí tað nú gerst meira áhugavert at verða lærlingur.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri persónar, ið eru í læru.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið lækkar skattin hjá lærlingum. Mett verður, at fyri flestu lærlingar verður talan um ein skattalætta á umleið 19.700 kr. árliga, ella 1.650 kr. mánaðarliga.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið heimilar landsstýrismanninum at áseta reglur í kunngerð.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Í § 33 er ásett hvat kann dragast frá skattskyldugu inntøkuni, áðrenn skattur verður roknaður. Innsett verður, at lærlingar nú kunnu draga upp til 50.000 kr. frá árliga í skattskyldugu inntøkuni.

Hvør verður fevndur av frádráttinum?
Ætlanin er, at frádrátturin skal vera veittur øllum lærlingum, sum eru fevndir av einum galdandi lærusáttmála. Tað vil siga, talan skal vera um persónar, ið eru í sokallaðari meistaralæru ella sveinalæru.

Fyri at verða mettur sum lærlingur sambært uppskotinum, skal í minsta lagi onnur av hesum treytum verða lokin:

1. Talan skal vera um sáttmála, ið er góðkendur av Yrkisdeplinum.
2. Talan skal vera um lærusáttmála, har úbúgvingin er skipað og lønt sambært sáttmála millum fakfelag og arbeiðsgevara á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Yrkisdepilin góðkennir nógv tær flestu lærlingaútbúgvingarnar, bæði innan handverk, handil, skrivstovu, matvørur o.s.fr. Reglurnar eru soleiðis, at lærutíðin ikki byrjar, fyrr enn Yrkisdepilin hevur góðkent sáttmálan.

Tó eru fleiri útbúgvingar, ið Yrkisdepilin ikki góðkennir, men sum eisini eftir ætlan skulu verða fevndar. Sum dømi kunnu nevnast lærlingar í tryggingarfeløgum og peningastovnum, lærlingar á apotekinum (farmakonomar) og líknandi útbúgvingar. Hesar útbúgvingar verða ikki góðkendar av Yrkisdeplinum. Men tær eru skipaðar og løntar sambært sáttmála millum fakfeløg og arbeiðsevarar á føroyska arbeiðsmarknaðinum, og lúka tær tí seinnu treytina og verða sostatt fevndar av frádráttinum.

Tað finnast eisini útbúgvingar sum lúka báðar treytirnar. Men her er hugsanin, at er talan um lærusáttmála, ið Yrkisdepilin skal góðkenna, so kann frádrátturin ikki veitast fyrr enn Yrkisdepilin hevur góðkent sáttmálan.

Tað finnast eisini útbúgvingar, ið ikki eru lærlingaútbúgvingar, men har starvsvenjing er ein partur av útbúgvingini. Sum dømi kunnu nevnast lærarar, námsfrøðingar, sjúkrarøktarfrøðingar og líknandi. Hesi verða ikki fevnd av frádráttinum, tí tey eru ikki fevnd av einum lærusáttmála.

Hvat fevnir frádrátturin um?
Ásett er, at dragast kunnu frá upp til 50.000 kr. árliga í inntøkuni. Hetta merkir, at um inntøkan er minni enn 50.000 kr., verður frádrátturin minni enn 50.000 kr. Tað vil siga, at inntøkuuppgerðin fer ikki at vísa hall, um tað skuldi komið fyri, at inntøkan er minni enn 50.000 kr.

Við inntøku verður hugsað um alla ta vanligu skattskyldugu inntøkuna. Tað vil siga, tað umfatar bæði lærlingalønina og aðra skattskylduga inntøku, sum lærlingurin hevur, t.d. aðra arbeiðsinntøku, skattskyldugar almennar veitingar og líknandi.

Men talan skal tó vera um vanliga skattskylduga inntøku. Dragast kann ikki frá í inntøkum, sum ikki verða skattaðar sambært vanliga skattastiganum, sum til dømis inntøku frá FAS-skipanini, uttanlandsinntøku sambært § 25b ella líknandi.

Tíðarskeið
Lærlingar byrja sjáldan í læru 1. januar, og lærutíðin fylgir tí sjáldan inntøkuárinum. Ásett verður, at tey árini, har persónarnir bara eru lærlingar ein part av árinum, verður frádrátturin roknaður eftir dagatalinum. Um til dømis lærlingatíðin umfatar 100 dagar, og tað eru 365 dagar í inntøkuárinum, verður frádrátturin 13.700 kr. (=100 * 50000 / 365).

Lærlingar eru í skúla ein part av lærutíðini. Frádrátturin er galdandi fyri alla lærutíðina, tað vil siga, eisini tey tíðarskeið, har lærlingurin er í skúla.

Kunngerðarheimild
Innsett verður eisini ein kunngerðarheimild, har ásetast kann, hvørjar tíðarfreistir eru galdandi, og hvussu skal farast fram viðvíkjandi umsókn og váttanum. Innsett verður eisini ein heimild til at krevja, at lærlingar lata neyðug skjøl og upplýsingar talgilt. Endamálið er at minka um umsitingarliga kostnaðin hjá TAKS.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 28. oktober 2019

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá TAKS
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Vinnuhúsinum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Yrkisdeplinum
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Landsfelag Handverkaranna
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Føroya Handverkarafelag
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá YTF